# Tað er búskapurin - tín idiot!

SJÚRÐUR SKAALE



**Kreppa er, og sum vant krevur sambandið danskar pengar. Søgan er 100 ára gomul...**

Sambandsflokkurin veksur - og hann díkir á í hesum døgum. Hann hevur svarið uppá allar okkara avbjóðingar. Svarið er ikki nýtt, men tað er einfalt, ítøkiligt, og lætt at seta í verk. Svarið er hægri blokkur!

Hesin offensivurin fær ein at hugsa um, hvussu lítið er broytt í føroyskum politikki.

Í 1927 skrivaði Jørgen Frantz Jacobsen ein kronikk í Politiken um viðurskiftini millum Føroyar og Danmark.

Tann gløggi ungi maðurin helt, at ”Forholdet mellem Danmark og Færøerne kan blive langt hjerteligere, mere naturligt og mere stabilt, hvis det kan befries for sit nuværende ubehagelige præg af at være et pengemellemværende.”

Men hann var greiður um, at tað í politisku skipanini í Føroyum var innbygd ein mekanisma, sum fór at gera hetta trupult: ”Det findes ikke noget dansk parti på Færøerne. Derimod findes der et parti (sambandspartiet) det bygger sin politik på de statstilskud, man kan få fra Danmark.”

Jørgen Frantz dugdi væl at síggja, at tað var ómegd, sum var grundarlagið undir Sambandsflokkinum: ”Jo værre det står til, des fastere sidder sambandspartiets stemmer. En politik, der på denne måde bygger på egen uformåenhed, kan være lige så sikker i sin sag som accelerationens lov.”

Tá ein stórur partur av valdsapparatinum ikki livir politiskt av egnum visiónum og loysnum men av máttloysi og ómegd, er skjótt at gerast dapurskygdur: ”Spørgsmålet er nu blot, (...) om det i længen er berigende, endsige sundt for et folk at modtage så store tilskud udefra. (...) Lige så lidt som man tør tro, at det udvikles nogen dygighed hos en person, hvis hele tilværelse er bygget på fremmedhjælp, lige så lidt tør man tro det om et samfund."

**It's the economy**

So skrivaði skaldið. Og tað mest áhugaverda við hesi grein - og mongum líknandi - er, at einki er broytt. Hon kundi tað sama verið skrivað sum viðmerking til dagsins sambandsmenn.

Men boðskapurin til føroyska sjálvstýrisvongin er eisini tann sami: Tað er búskapurin, sum avgerð stríðið millum sjálvstýri og samband!

Búskapurin er eisini avgerandi aðrastaðni. Undir valstríðnum í 1992 bleiv Clinton jú kendur fyri orðini: I'ts the economy, stupid! Hvør skal siga: Tann, sum stýrir búskapinum væl, vinnur. Tann, sum stýrir illa, tapir.

Men í Føroyum er henda mekanisma avskeplað. Er búskapurin illa stýrdur - uttan mun til, hvør hevur stýrt - so vinnur sambandið. Tí sambandið talar til ómegdina. Og sambandið lovar fólkið danskar pengar.

**Trupulleikin er raksturin**

Tað er greiður sjálvstýrismeiriluti á tingi. Og hesin meiriluti má altíð hava orðini hjá Clinton í huga: It's the economy, stupid! Veruligur sjálvstýrispolitikkur er ábyrgdarfullur fíggjarpolitikkur. Hvørki meir ella minni.

Og fíggjar- og vinnupolitikkurin hevur ikki verið ábyrgdarfullur leingi. Vit tjena so lítið í mun til tað vit brúka, at um so eingin íløga varð gjørd í ár, kláraðu vit ikki at fíggja raksturin. Við blokki!

Miðlarnir tosa nógv um íløgur. Tí tær eru ítøkiligar og lættar at taka støðu til. Men íløgurnar eru ikki trupulleikin. Vit skulu hava bæði marknagilsdepil og sandoyartunnil og flogvøll og mangt annað. Tað skal raðfestast - men tað skal gerast. Og Føroyar koppa ikki, hóast vit taka stór lán til íløgur.

Vit spæla heldur ongar atkvøður upp í føvningin á Edmundi & Co fyri tað, um vit læna til íløgur.

Men so leingi vit ikki klára at fíggja raksturin, regna atkvøðurnar niður í sambandsleypin. Tað er líka víst sum "accelerationens lov"...

Tað verða ikki talur ella analysur, sum steðga framgongdini hjá sambandinum. Hon steðgast bara av einum politikki, ið kann skapa javnvág millum inntøkur og útreiðslur. It's the economy, stupid!

# Lokalpolitikkur, - Operatión Glyvursnes

TÓRBJØRN JACOBSEN



Flogvallarmálið er aftur á breddanum. Komandi verklagslógin um útbyggingina, sum tingið var samt um fyri fleiri árum síðani, elvir aftur til nýtt kjak, og føroyingum ikki ólíkt, so er ongin kontinuitetur, ongin samanhangur í nøkrum, og alt málið verður tikið upp til nýggja viðgerð, nú vit nærkast evstamarkinum, har ið veruleikin verður avloystur av hugskotsríku prosessini, nú, táið einasta portrið til flogferðslu millum okkum og umheimin skal skipast samfelagnum til frama og frægasta gagn.

Fyri viku síðani verða nakrir politiskir oddvitar samrøddir á nationala sjónvarpsskíggjanum. Vinnunevndarformaðurin hevur onga meining, tí flokkurin hevur ikki viðgjørt málið. Poul Michelsen boðar væl saktans fyri Fólkaflokkin frá, at minst møguligt skal útbyggjast í Vágum og alternativi framsøgumaðurin í flogvallarmálum hjá Tjóðveldinum, Sjúrður Skaale, er tann mest bersøgni, táið hann greitt boðar frá, at vit ikki skulu skunda útbyggingina ígjøgnum áðrenn jól, tí bíðast má eftir eini kanning av flogvallarviðurskiftunum í Søltuvík og á Glyvursnesi, og eru hesar væntandi í mars mánaða 2010.

Var í nøkur ár framsøgumaður hjá Tjóðveldinum í flogvallarmálum, og alt bendir á, at støðan, sum vit bæði Heidi Petersen høvdu í hesum essentiella máli, er broytt fundamentalt. Í drúgva álitinum, sum varð skrivað í samband við uppskotið hjá Djurholm um at stovna partafelagið Vága floghavn, gjørdu vit greitt, at vit hildu lítið um politiska maktaloysi, sum fyrra ABC-samgongan hevði sýnt, táið hon avreiddi dønum Íleggingargrunnin. Táið hetta nú var hent kortini, so valdu vit ta pragmatisku loysnina at mæla til útbyggingina við fíggjarligu realiseringini av tí niðurlaðaða grunninum, og hartil boðaðu vit greitt frá í sama áliti, at Tjóðveldisflokkurin samanumtikið tók undir við, at flogvøllurin nú varð útbygdur í mest møguligan mun. T. v.s., at lendingarbreytin verður 1800 metrar.

Ein alternativur flogvøllur var eisini nevndur í hesum áliti. Soleiðis verður skrivað: “Táið hetta arbeiðið (í Vágum, tj-.) er liðugt um nøkur ár, er tíðin komin til at taka avgerðina, eftir ráðum frá skikkaðum fólki, um hvar ið ein alternativur altjóða flogvøllur skal gerast í landinum. Ein flogvøllur, sum fyrst og fremst skal plaserast eftir tørvinum, sum væntast at fara at vera á flogferðslu og flutningi loftvegis tey næstu 100-200 árini, og ikki samsvarandi lokalpolitiskum atlitum, soleiðis sum tað ofta hevur verið róð framundir, eisini undir tingviðgerðum. Í kjakinum hava fleiri møguleikar verið nevndir, eitt nú Søltuvík, Glyvursnes, Skorhæddin, Svínoy o.s.fr.”

Stívliga hálvt ár eftir hetta leggja fimm tingfólk uppskot fram til samtyktar, har heitt verður á landsstýrið um at fyrireika og leggja fyri Løgtingið uppskot til verklagslóg um skjótast gjørligt at byggja altjóða flogvøll í Føroyum, ið er minst 2200 metrar til longdar, við møguleika fyri leingjan. Samstundis varð heitt á landsstýrið um at tryggja, at lendi, sum talan kann verða um at brúka til nýggja flogvøllin, ikki verða nýtt til onnur endamál. Uppskotið varð samtykt.

Táið vinnumálaráðið fekk frænir av hesum uppskoti, fingu menn á Tinganeshelluni bráðliga ein óvanligan skund. Tíðindafundur og hov verða hildin á Hafnia gistingarhúsinum árla á morgni, fyri uppfaringartíð. Har verður lokalpolitiska Djurholm-doktrinin í flogvallarmálum kunngjørd. Hann fráboðar og setir kanningar í verk í Søltuvík og á Glyvursnesi. Allir aðrir møguleikar vera útihýstir. Orsøkin sigst vera ein neyðarslig og óvanliga pírin kanning, mest átøk túnatosi, sum norska partafelagið Asplan Viak hevði latið frá sær 10. august 2006. Onkur sigur, at hon kostaði vinnumálaráðnum slakar hundrað túsund krónur, og tað sæst aftur í greiningini, tí hon byggir fyri tað mesta á leysar metingar. Eitt nú er fjallið Tyril ein bági fyri eini loysn á Skorhæddini, Klórarin omanfyri Skála ein annar (her eru Strendur og Skála komin í bland hjá teimum ókunnugu) og síðani er Múlin yviri á streymoyarlandinum mín sann eisini ein forðing. Skemtiligastir eru teir tó í útsøgnini: “Uten å ha rådført oss med meteorologer kan vi likevel med stor sikkerhet si at alvorlige turbolenser oppstår ved vindretninger på tvers av fjorden.”

Hendan bílagda traktatin frá norðmonnum avgjørdi alt. Søltuvík var vald sum kanningarøki uppá hvamsvís, vøllurin har kann í mesta lagi verða 1800 metrar til longdar, helst ikki longri enn 1650 metrar. Útihýsingarmetodan, við Sandoynni sum fiktivum alternativi, skuldi fremja kongstankan hjá Djurholm og Fólkaflokkinum, sum er, at ein altjóða flogvøllur skal leggjast útella inneftir Glyvursnesi.

Høvdu vit vitað, at hetta var besta alternativa loysnin, so var tað í lagi. Hetta fáa vit tó ongantíð greiði á, tí aðrir møguleikar ongantíð verða kannaðir, hóast tingsamtyktina frá 20. november, táið uppskot okkara til samtyktar fekk ein meiriluta fyri sær á tingi.

Sambært ársfrágreiðingini hjá Landsverki fyri 2008 er greitt, at Djurholm-doktrinin framvegis livir sítt fríska lív og er kreddan hjá føroyskum verkfrøðingum, í hvussu er teimum alment løntu á Landsverksbásinum, beint andvegis omanfyrinevndu tingsamtykt. Sagt verður í grein hjá Ewaldi Kjølbro: “Landsverk hevur tey seinastu fimm árini kannað møguleikarnar fyri einum alternativum flogvølli í Føroyum. Grundað á veðurfrøðiligu mátingarnar síðani 2006 verður ein fyribils niðurstøða gjørd seinni í ár um veðurfrøðiligu viðurskiftini og inn- og útflúgvingar umstøðurnar í Søltuvík og á Glyvursnesi. Eru hesi støðini egnað, verður arbeitt víðari við málinum, soleiðis sum tilmælið kann fyriliggja næsta ár.”

Í eina tíð hava loyniligir skýmaskotsfundir verið hildnir í Havn um landsins flogvallarviðurskifti. Útvaldir flogskiparar, í starvi hjá nationala flogfelagnum, aðrar staðir høvdu teir helst verið róptir “renegatar” og havt eina óvissa framtíðarlagnu, og serliga útpeikaðir politikarar hava dúgliga hitst, helst fyri at skáka ætlaðu útbyggingina í Vágum. Táið alternativi framsøgumaðurin hjá Tjóðveldinum í flogvallarmálum mælir til at steðga ætlanunum í Vágum, meðan vit bíða eftir veðurmátingum og niðurstøðuni viðvíkjandi Glyvursnesi (Søltuvík er sum sagt bara hjáputur í veruligu kabalini), er tað bara eitt tekin um, at onkur er krøktur á agnhaldinum hjá Djurholm, í hansara merkiliga lokalpolitiska framferðarhátti í avgerðandi málinum um loftvegis ferðamøguleikarnar hjá føroyingum í ókomnum døgum.

Tað hevur verið ein rímilig semja um útbyggingina í Vágum. Væntuliga er framvegis ein tingmeiriluti fyri henni, men um semja er um at víðka flogbreytina út á 1799 metrar, soleiðis sum Tjóðveldi skjeyt upp í álitinum um pf. Vága floghavn á sinni, tað vita vit ikki, fyrrenn atkvøtt er um verklagslógina, sum er væntandi frá vinnumálaráðnum ein av fyrstu døgunum. Ein nýggjur altjóða flogvøllur kostar tað mesta av tveimum milliardum krónum, so tey fáu hondoyruni, sum leypa av, um ætlanin í Vágum ikki skal verða meira enn 1600 metrar til longdar muna í tí høpinum ikki meira enn eitt evarska lítið kolapetti á grúgvuni hjá Belsebub.

Fremjið bestu ætlanina í Vágum, og farið so undir at kanna alternativu flogvallarviðurskiftini sambært tingsamtyktini um alternativan altjóða flogvøll. Lokalpolitiska Djurholmdoktrinin, ið eins og ein kyklopur einvegis sær fyri sær møguleikar í Suðurstreymoy, og sum hevur fingið yvir sær ein sekteriskan dám, nú ráðleggingar og spunasmíð fara fram í tøttum cellum, millum útvaldar pilotar og politikarar, kunnu í besta føri hava tað við sær, at als ongin loysn fæst á flogvallarmálinum í fleiri áratígggju frameftir. Sum skaldið tók til á sinni: “Saman at halda var ei okkum givið, tí er so lítið burtur úr her blivið.”

Soleiðis sær málið út í optikkinum hjá einum fyrrverandi framsøgumanni Tjóðveldisins í vinnu- og harvið flogvallarmálum.